ÍF-B68 3-1 (1-0):

# Nógv er nýtt í Fuglafirði

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Síðani niðurflytingina í 1999 hevur tað leikliga ikki gingið nakran veg hjá ÍF. Í hvussu so er ikki rætta vegin, hóast teir hava verið undir liðunum, sum eru flutt upp.

Men nú kann tað væl fara at vísa seg, at vend fer at koma í. Tað var oyggjaruppgerðin ímóti teimum næstbestu av Toftum leygardagin ikki sørt av ábending um. Ikki óvæntað var í 1. hálvleiki greitt omaná. Teri skoraðu fyrsta stóra hálva tíman tý mál, og harvið var avgjørt, hvør skuldi hava stigini.

Eftir steðgin minkaði B68 beinanvegin um munin. Miðvallarin í høgru, Jóhan Dávur Højgaard, átti síðsta fótin á, eftir at bólturin var komin innfyri. B68 var meira við í 2. hálvleiki, og vetranbrøðurnir, Ingemar (í miðverjuni) og Aksel (í álopinum) Højgaard, fara ivaleyst saman við fleiri ungum og hugagóðum spælarum, sum eru við í kappingini um plássini á besta liðnum, at fáa fleiri stig. Men B68 megnaði ikki at kroysta ´F, og árið fer at vísa, um stigini fara at verða somikið mong, at B68 fer at sleppa undan at flyta niður aftur í 3. deild, sum teir í fjør vunnu seg upp úr.

Fuglfirðingar hava fleiri ungar spælarar, og Sigríður Clementsen, sum er venjari, hevur spælskipanini um frá 3-5-2, sum ÍF hevur hildið seg til, til 4-4-2.

Jákup Helgi Egholm, sum í fjør vandi eitt sindur við HB, er aftur í ÍF málinum, har hann kapapst við unga Fróða Poulsen. Áki Petersen, sum í fjør var á Skála, er í miðverjuni saman við Viggo Johannesen. Jan Skoradal, sum áður hevur spælt við GÍ, var í høgra verjuborðið, og ein nýggjur og ungir maður, Sverri Ellingsgaard, var vongverji í vinstru. Á miðvøllinum var unglingaspælarin, Atli Petersen, í høgru, og í vinstru var veteranurin, Heini Heinason. Mitt fyri vóru John Thomsen og Høgni Zachariasen, sum hava verið við í fleiri ár. Á álopinum var Eyðolvur R. Petersen saman við unglingaspælaranum, Hanusi Eliasen. Ein annar unglingaspælari, Fritleif í Lambanum, kom á vøllin í seinna hálvleiki.

Heini Heinason skoraði fyrsta ÍF-málið, eftir at Petersen hevði lagt innfyri úr høgru, og Hanus Eliasen økti til 2-0 og 3-0. Í báðum førunum var tað úr stuttari fjarstøðu, at hann sendi framvið B68 málverjanum. Í B68 stóð Mortan Hansen, sum áður hevur verið í NSÍ álopinum, og sum eisini hevur roynt seg í álopinum í 1. deild hjá B68.

**ÍF-B68 3-1 (1-0)**
1-0: Heini Heinason
2-0: Hanus Eliasen
3-0: Hanus Eliasen
3-1: Jóhan Dávur Højgaard

VB-Sumba 0-1 (0-0):

# Stigini fóru suðureftir

**Sumba tók alt við sær, tá teir vitjaðu í Vági leygardagin**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Grannauppgerð var á skránni í Vági, tá sumbingar longu í fyrsta umfarinum vitjaðu. Sumbingar hava í ár gjørt seg nakað út við fleiri nýggjum ulendingum, og við fyrrverandi VB-leikaranum, Robert Cieslewicz sum venjara, eru vónirnar í øllum førum til eitt pláss heilt ovarliga á stigatalvuni.

Hjá VB eru vónirnar hinvegin heldur róligari, og ivaleyst er tað so, at teir í veruleikanum eru nødgir, bara liðið megnar at halda sessin í deildini.

Tí var sigurin hjá Sumba nokk ikki heild óvæntaður, men tað tók tó drúgva tíð, áðrenn hesin kundi staðfestast. Nógvi vindurin darvaði spælinum heilt nógv.

Kanska var tað Sumba, sum hevði eina lítla leikliga yvirvág, men hinvegin hevði heimaliðið eisini fleiri møguleikar, men hvørja ferð rendu teir seg í nýggja pólverska málverjan hjá Sumba, sum stóð ein sera góðan dyst.

Og meðan ein pólverji soleiðis forðaði vágbingum í at skora, so vóru tað eisini pólverjar, sum syrgdu fyri einsamalla málinum hjá Sumba. Robert Cieslewicz fangaði ein bólt, meðan VB-verjan snorksvav, og hann gjørdi skjótt av. Kúlan varð send yvir til nýtilkomna Robert Samiar, og hann var eirindaleysur, tá møguleikin beyðst.

Við sigrinum syrgdu sumbingar fyri, at teir í øllum førum hava fingið eina góða byrjan upp á árið, og so er spurningurin, um teir hesa ferð megna at halda fast um oddastøðuna alt árið á tamb.

**VB-Sumba 0-1 (0-0)**
0-1: Robert Samiar

KÍ-LÍF 3-1 (1-0):

# LÍF fekk einki í Klaksvík

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Hjá teimum næstbestu í Klaksvík er setningurin altíð at fáa so mikið nógv stig, at liðið framvegis skal halda fram í næstbestu deildini. Soleiðis er tað eisini í ár. Í fjør eydnaðist tað at skava so mikið saman í nógvu teimum fyrstu umførunum, at tað so at siga lupu fleiri stig av, tá ið tað nærkaðist kappingarenda, og KÍ slapp væl og virðiliga undan niðurflytingar hóttanini.

LÍF plagdi at vera við í kappingini um heiðursmerkini og harvið uppflyting til bestu deildina, men nú eru tað fleiri ár síðani, at leirvíkingar vóru so mikið væl fyri. Tey seinnu árini hevur LÍF fleiri ferðir verið við í stríði fyri at sleppa undan niðurflyting.

Um úrslitið í grannauppgerðini í Klaksvík í fyrsta umfarinum skal takast sum mátisnórur, so kundi tað bent á, at luturin hjá KÍ og LÍF fer at líkjast honum, sum var galdandi í fjør.

KÍ vann 3–1, og tað var bara lítlu løtuna, eftir at LÍF hevði minkað um munin til 2–1, at teir hóttu KÍ. Men so skoraði heimaliðið eftir skjótálop, og harvið var spenningurin burtur.

Miðverjin Andrass Jacobsen skoraði fyrsta KÍ málið miðskeiðis í 1. hálvleiki. Tað gjørdi hann, eftir at hann hevði vunnið bóltin av LÍF miðverjuni og gjørdist einsamallur við Allani Joensen í LÍF málinum.

Eftir ein tíma økti Marius Nystrøm Hansen. Uppspælið var í høgru, og bólturin støkk eftir takling í brotsteiginum til Marius, sum var leysur og skoraði.

LÍF minkaði um munin í 79. minutti. Petur Sjúrðarberg varð feldur í brotsteiginum, og málverjin, Allan Joensen, sendi bóltin framvið John William Joensen í KÍ málinum.

Og so var tað, at LÍF luktaði í hvussu so er eitt stig í einar fimm minuttir. KÍ verjan kendi seg kroysta og sparkaði fleiri ferðir burtur. Men fimm minuttir fyri leiklok staðfesti 16 ára gamli Jón Jacobsen, sum fyrstu ferð royndi seg í vaksnamannadeildini, heimasigurin. Í kontraálopi í høgru, sum David Bertholdsen og John Havn stóðu fyri, legði seinast nevndi innfyri til ódekkaða miðvallaran í vinstru, sum skoraði.

**KÍ–LÍF 3–1 (1–0)**
1–0: Andrass Jacobsen
2–0: Marius Nystrøm Hansen
2–1: Allan Joensen br
3–1: Jón Jacobsen

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 1 | 1 - 0 - 0 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 2 | ÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 3 | KÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 4 | B71 | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 5 | Sumba | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 | VB | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 7 | AB | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 8 | LÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 9 | B68 | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 | B36 | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

Fríggjakvøldið 23. mai:
DJ Rúni Kjær
Leygarkvøldið 24. mai:
live! Fluffy Toys
+ DJ Kristin Jensen
opið er:
fríggjadag 23.00 - 04.00
leygardag 23.00 - 04.00
club20 discoteque

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkkort
Føroya Tele Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Sørvágur - Tórshavn kl. 23.00
• Miðvágur - Tórshavn kl. 23.15
• Sandavágur - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vágar kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

Kaggin
Hóskvøldið
Spæla
Déjà Vu
Double Up 21.00 - 22.00 – ókeypis atgongd
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið
Spæla
Rouge
www.kaggin.fo
Sosialurin - 341800

Busskoyring
Øll busskoyring upp til 17 ferðandi dag og nátt

• Útferðir
• Jólafrokostar
• Fótbóltsdystir
• Bindiklubbaútferðir
• Polterabend
• Turistferðir
• Uttanlandsferðir
• Annað
Ring og fá eitt tilboð
AK Busskoyring Tlf 215656

BÍLEGG PIZZA FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT

HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

STÓRUR STEVNUDANSUR Í ÍTRÓTTARHØLLINI Á SKÁLA LEYGARKVØLDIÐ 24. MAI VIÐ ALL THAT RAIN

Bussar í samband við dansin:
úr Tórshavn kl. 22.30 (tilmelding á tel 21 93 23)
av Eiði kl. 23.00
úr Fuglafirði kl. 23.00
av Toftum kl. 23.00
Bussarnir koyra heim aftur av Skála eftir dansin kl. 04.30
www.allthatrain.com hosted by: FaroeNet

Fríggjakvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Diskotek
við DJ Martin
Ókeypis atgongd til kl. 24
Happy Hour 23-24
Leygarkvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Diskotek
við DJ Petur
Ókeypis atgongd til kl. 24
Ladies Night til kl. 01
BAROK

FELAGIÐ TÓRSHØLL
Hóskvøldið undirhalda
Georg og Ronnie
Í Vikuskiftinum spæla
UNITED
Ókeypis atgongd fríggjakvøldið til kl. 01.00
TÝSDAGIN
27. mai
Sjavskapping kl.19.00
Bíligar eindir allar dagar
Sosialurin 341800

Ja... soleiðis smakkar success !

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant
Nýtt navn - nýggj matskrá • Opið hvønn dag frá 12-14 & 18-22 • Hotel Føroyar • Tel 31 75 00